## Granskingarverkætlanir innan sjúkufyribyrging í alivinnuni

Vinnumálastýrið skal við hesum kunngera, at á løgtingsfíggjarlógini fyri 2000, konto 6.36.104., er peningur játtaður til granskingarverkætlanir/havbúnaðarroyndir innan:

**Fyribyrging av sjúkum í alifiski.**

Stuðul kann veitast til:
- Tiltøk innan rakstur
- Tiltøk innan sjúkuansing
- Tiltøk sum betra diagnostisku kanningarhættirnar

Undir ávísum treytum, sum eru nærri lýstar á serligum umsóknarblaði, sum umsøkjarar skulu fylla út, kann stuðul verða veittur til granskingarverkætlanir/havbúnaðarroyndir til fyribyrging av sjúkum í alifiski. Verkætlanirnar kunnu fevna um tiltøk innan rakstur, sjukuansing og til betring av diagnostiskum kanningarhættum.

Umsóknarblað kann fáast við at venda sær til avgreiðsluna í Vinnumálastýrinum á telefon nr. 356060, fax nr. 356065, e-post vms@vms.fo , heimasíða www.vms.fo.

Umsóknarblað saman við neyvari lýsing av endamálinum, kostnaði og fígging av verkætlanini, og onnur fyri viðgerðina relevant skjøl, skulu vera Vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 29. februar 2000.

Vinnumálastýrið
Vinnumáladeildin
Postboks 377 • FO-110 Tórshavn
Telefon 356060, Telefax 356065,
E-postur: vms@vms.fo
Heimasíða www.vms.fo

## 2 størv sum hjálparfólk eru leys at søkja

**Søkt verður eftir 2 hjálparfólkum at byrja 1. mars 2000.**

Annað starvið umfatar m.a. at vaska upp á framleiðsludeildini, og at hava ábyrgdina av matstovuni. Harafturat at ganga ørindi, avgreiða postpakkar og annað fyrifallandi arbeiði.

Hitt starvið umfatar m.a. at hava ábyrgdina av goymslu okkara á Staravegi, og at hjálpa til í framleiðsluni. Harafturat at hjálpa til í vørumóttøkuni og annað fyrifallandi arbeiði.

Bæði størvini eru fulltíðarstørv.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skulu verða Apotekinum í hendi áðrenn 7. februar 2000.

TJALDURS APOTEKIÐ
Postboks 3010
110 Tórshavn

## Innleiðandi skeið í kolvetnisverkfrøði

Møguleiki er hjá einum (vegna hølisviðurskiftum) avmarkaðum tali av luttakarum við nakað av tekniskum ella náttúrufrøðiligum forkunnleika at luttaka í innleiðandi skeiði í kolvetnisverkfrøði, sum Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya skipar fyri í várlestrarhálvuni. Lærarar á skeiðinum eru frá Fróðskaparsetri Føroya, Náttúrugripasavninum, Høgskolen í Stavanger, Statoil og Danmark Tekniske Universitet.

Skeiðið umfatar m.a. oljuboritøkni, organisering av oljufyritaksemi, jarðfrøði, føroysk jarðfrøði, jarðevnafrøði, boriholsmátingar, seismikk, reservoirtøkni og pvt-greining, heilsu-, umhvørvis- og trygdarviðurskifti, boripallar og infrastruktur.

Skeiðið inngongur eisini sum byrjunarskeið fyri studentar í 4. lestrarhálvu, sum í september ár 2000 byrja lestur av BS-yvirbygninginum til kolvetnisverkfrøði. Skeiðið verður undirvíst sum heildagsundirvísing í 3 vikur:

1.- 4. februar 2000
22.-25. februar 2000
9.-20. mars 2000

Um ynskist, kann próvtøka takast í skeiðinum.

Eru spurningar viðvíkjandi skeiðinum, kunnu tygum venda tygum til, Magnus Danielsen, professara, á Náttúruvísindadeildini.

Áhugað í skeiðinum kunnu innskriva seg til skeiðið, so leingi pláss er eftir við at venda sær til skrivstovuna á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, telefon 315306.


DYNAPAC
-maskinurnar sum halda!
- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir



Keyp góðsku – keyp Dynapac!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

fk

AMBOÐ
Gevind amboð - AC amboð - Tente hjól - Ketusagir - alt til drejibenkur - Trýstspularar - Sveisitól - Luftkompressarar - Taljur - Stroppar - Skjótiseym - Sláimaskinur - Støvsúgvarar - Stigar - Flakaknívar - El-aggregat - Laditól - El- og hondamboð - Luftslangur - Spulislangur - útleiguamboð - Umvæling.
Keyp har tú fært mest fyri pengarnar.
Góð servica.
Keyp frá fakmanninum ...
Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442

FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT



SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 31 22 22


## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Skeið í samstarvi við Før. Heimavirkisfelag

| | |
|---|---|
| Skeiðsheiti: | TØVING |
| Undirvísingardagar: | Leygardagin 29. januar |
| | – 5. februar |
| | – 12. februar |
| Undirvísingarstaður: | Argja skúli |
| Lærarar: | Herbjørg Dalsgaard |
| | Margit Glerfoss |
| Tilmelding: | tlf. 31 29 40 og tlf. 31 36 60 |
| Tilmeldingargjald: | 300 kr. |

Halt sosialin

